**Leiðbeining til lærarar**

# Føroyskt

**4.-6. floksstig**

**1. august 2023**

Krøvini til lærugreinina føroyskt eru ásett í námsætlanini í føroyskum 1-A og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – føroyskt 1-A
- Støðisnámsætlan
- Leistur – eftirmeting og afturboðan

## Tímatal

Undirvísingin á 4., 5. og 6.. floksstigi fevnir vanliga um seks undirvísingartímar um vikuna øll trý árini.

# Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki ... 3
1.1. Talaða málið ... 3
1.2. Skrivaða málið ... 3
1.3. Málkunnleiki ... 4
2. Førleikar ... 4
2.1. Faklig førleikamál – 6. floksstig ... 4
2.2. Støðisførleikar ... 8
2.2.1. Lesing ... 8
2.2.2. Skriving ... 9
2.2.3 Munnligt samskifti ... 10
2.2.4 Kt- førleikar og talgildisbúgving ... 10
3. Eftirmeting og afturboðan ... 11

# 1. Kjarnaøki

*Lærugreinin føroyskt hevur trý ymisk kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*

*Føroyskt 1-A*

## 1.1. Talaða málið

*Kjarnaøkið talaða málið snýr seg um at tosa, at lurta, at skilja og at rannsaka talaða føroyska málið. At samskifta væl og skiljandi og at lurta eru avgerandi sosialir og mentanarligir førleikar. Støðan, samskift verður í, skapar karm um samskiftisháttin. Undirvísingin skal tí fevna um ymisk munnlig tekstsløg og margháttað tekstsløg, sum hvørt á sín hátt skulu styrkja fatanina av ymsum munnligum samskiftisháttum og av leiklutum teirra samskiftandi.*

*Føroyskt 1-A*

Talaða málið í miðdeild fevnir bæði um menna og nýta málið virkið í undirvísingarhøpi og í natúrligari samveru við skúlafelagar og onnur. Tey skulu halda fram at menna sínar málsligu førleikar og læra at samskifta og at nýta málið í undirvísingarhøpi, eins væl í ymiskum gerandisligum støðum. Tey skulu læra at málbera seg væl og trygt og at nýta skiftandi og beinraknan málburð eftir endamáli og støðu. Tey skulu við lurta eftir eitt nú upplestri, útvarps- og sjónvarpsendingum og røðum, læra at gera egnar hugsanir um innihaldið og síðan samskifta og bera fram hugsanirnar og grundgeva fyri sjónarmiðunum. Eisini eigur undirvísingin at geva næmingunum møguleika at halda munnligar framløgur, bæði einsæris og í bólkum.

## 1.2. Skrivaða málið

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um at lesa og skriva føroyskt. At lesa og skriva eru javnskipaðar læritilgongdir, har næmingurin mennir skriviførleikan við at lesa og lesiførleikan við at skriva. Hugur næminganna at lesa og skriva skal stimbrast og somuleiðis tilvitan teirra um lesi- og skrivitilgongdina. Undirvísingin skal fevna um eitt fjølbroytt úrval av ymiskum fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini marghháttaðum tekstsløgum.*

*Føroyskt 1-A*

Skrivaða málið í miðdeild fevnir um at lesa og skilja lisnan tekst og at skriva og skapa ymiskar tekstir, t.d. frásagnir, søgur og hugskot. Skrivingin og lesingin eiga at stuðla hvørja aðra, og tí skal skrivingin vera fjøltáttað, miðvís og samskipað við hinar undirvísingarpartarnar í lærugreinini.

Lisna tekstúrvalið skal verða fjølbroytt, og dentur skal leggjast á tekstir og tekstsløg, sum eru viðkomandi fyri næmingarnar á hesum aldurstigi, og sum tey hava møguleika at kenna seg aftur í og fyrihalda seg til.

## 1.3. Málkunnleiki

*Kjarnaøkið málkunnleiki fevnir um føroyska málløru og málsøgu. Næmingarnir fáa innlit í málið sum skipan og tilknýti tess til mentan og samleika. Undirvísingin skal fevna um málløru á støðugt hækkandi torleikastigi, føroyska málsøgu og norðurlendska málfelagsskapin.*

*Føroyskt 1-A*

Málið við undirvísingini í miðdeild er, at næmingarnir framhaldandi menna sínar málsligu førleikar og varðveita hugin at læra, skilja og nýta málið bæði í talu og á skrift. Innihaldið í undirvísingini skal byggja víðari á førleikamálini í grunddeild og hækka stigvíst, bæði viðvíkjandi torleikastigi og í væntanum til skrivligu avrikini. Á hesum stigi skal undirvísingin eisini fevna um grundleggjandi málløru, so næmingarnir læra so mikið av málløru, at tey gerast før fyri at orða seg rætt, neyvt og fjølbroytt.

# 2. Førleikar

## 2.1. Faklig førleikamál – 6. floksstig

Fakligu førleikamálini í miðdeild eru leiðbeinandi ávegismál og orðað sum væntanir fyri fakligu úrtøkuna, sum stinnastu næmingarnir hava ognað sær eftir 6. floksstig. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *at orða seg rætt og greitt og nýta málið sum amboð í samrøðu, samstarvi og framløgu*

*Føroyskt 1-A*

Tað er trupult at allýsa neyvt, hvat tað ber í sær at duga at orða seg rætt og greitt, tí málið og málnýtslan broytast støðugt. Harumframt verða málið og málnýtslan lagað til endamálið og samskiftistøðuna, og tí er neyðugt at hava hesi í huga í sambandi við málmenningina hjá næmingunum. Málsliga menningin skal halda fram frá grundarlagnum, sum næmingarnir hava ognað sær frammanundan. Tey skulu læra at orða seg meira samanhangandi, rætt og greitt.

Bólkaarbeiði og samstarv millum næmingar eru vanligir arbeiðshættir í undirvísingini, og tí skulu næmingarnir áhaldandi menna sínar førleikar at lurta og nýta málið í vanligum samskifti, herímillum at bera fram sín kunnleika, sínar upplivingar og egin sjónarmið, umframt at taka støðu til og viðmerkja tað, sum onnur bera fram. Umráðandi er, at næmingarnir læra at arbeiða í bólki, at taka ábyrgd og at samstarva um arbeiðsbýtið.

Undirvísingin skal framhaldandi leggja dent á, at næmingarnir regluliga leggja fram fyri hvørjum øðrum, flokkinum og foreldrum.

- *at gera metingar og niðurstøður um ymiskt, sum næmingurin hevur sæð, hoyrt ella lisið og grundgeva fyri egnum sjónarmiðum*

*Føroyskt 1-A*

Hetta fakliga málið snýr seg um, at næmingarnir áhaldandi skulu búnast málsliga. Tí er neyðugt, at tey í einum tryggum og væl skipaðum undirvísingarumhvørvi taka virknan lut í undirvísingini.

Næmingarnir skulu verða eggjaðir til at seta orð á upplivingar, royndir og kenslur og soleiðis knýta samband millum egnar upplivingar við viðurskifti, sum tey hava sæð, hoyrt ella lisið um. Næmingarnir skulu læra at grunda um ymisk viðurskifti, sum verða tikin upp í flokkinum, ella sum tey hava lisið um. Tey skulu venja seg til sjálvstøðuga støðutakan og grundgeva fyri sínum sjónarmiðum.

- *at nýta hóskandi lesisnildir grundandi, herímillum at snarlesa, nærlesa og punktlesa*
- *at lesa fjølbroyttar tekstir flótandi og skilja og grunda um tað lisna*

*Føroyskt 1-A*

Viðvíkjandi snildum verður hugsað um at leggja eina miðvísa ætlan fyri at náa einum ávísum máli. Til hetta krevst, at næmingarnir duga at brúka røttu lesisnildirnar alt eftir, hvat endamálið við lesingini er. Tí hevur tað týdning, at tey øll skúlaárini læra um og arbeiða við lesisnildum, bæði avkodingarsnildum og fatanarsnildum. Endamálið er, at næmingarnir stigvíst sjálvir duga at brúka tær smidliga og lætt. Ein fortreyt fyri at gerast ein góður lesari er at kunna lesa skjótt, og grundarlagið fyri tí eru góðir avkodingarførleikar, t.e. at næmingurin dugir at lesa sjálvvirkið og neyvt. Í miðdeild eigur framhaldandi at verða arbeitt við at styrkja førleikarnar at lesa orð, soleiðis at næmingarnir eisini kunnu kenna ókend orð aftur skjótt og neyvt, t.d. tá ið orðini hava kendar rím- ella týdningspartar. At arbeiða við týdningspørtum verður gjørt, tá ið næmingarnir læra at benda og býta orð sundur í røtur, forstavilsir og endingar og arbeiða við samansettum orðum.

At lesa fyri at læra og tískil fata tað, sum lisið verður, krevur av næmingunum, at tey gera okkurt ávíst í lesitilgongdini. Næmingarnir skulu læra at brúka lesisnildir eftir endamáli. At snarlesa er at skimma tekstin fyri at kunna seg leysliga um innihaldið. At nærlesa er at lesa tekstin gjølla fyri at skilja innihaldið til lítar. Nærlesing verður nýtt, tá uppgávan er at greina og tulka ein tekst. At punktlesa (leitilesa) er at leita eftir ávísum upplýsingum í tekstinum, t.d. einum árstali ella navni. Tað hevur týdning, at tað verður arbeitt við ÁÐRENN lesing, MEÐAN lisið verður og AFTANÁ lesing. Næmingarnir skulu stigvíst læra sjálvir at duga á at skyna, nær tað er viðkomandi at brúka tær einstøku fatanarsnildirnar. Á henda hátt eru næmingarnir virknir í lesitilgongdini, og tað betrar um lesifatanina.

Næmingarnir skulu læra, hvussu tey, áðrenn tey fara undir at lesa nærri, eiga at yvirlitslesa, og hvussu arbeitt verður við m.a. undanvitan, t.d. heiti, hvør hevur skrivað bókina, og forsøgn**,** tað er at ímynda sær, hvat bókin/teksturin snýr seg um. Her er eisini neyðugt hjá næmingunum at duga at áseta endamálið við lesingini, og at vita, um talan er um yrkis- ella fagurfrøðiligan tekst, so hættir og snildir kunnu lagast eftir tí.

Næmingarnir skulu læra at seta spurningar til tekstin, meðan tey lesa. Spurningar verða settir til tað, sum stendur á reglunum, millum reglurnar og aftan fyri reglurnar. Næmingarnir skulu læra at gera sær greitt, um tey hava skilt tað, tey hava lisið, ella um tað er neyðugt at seta ferðina niður ella at lesa umaftur fyri at skilja betur. Ein partur av hesum er eisini at fáa greiðu á truplum orðum og truplum setningum. Næmingarnir eiga at læra at gera samandrátt, so hvørt sum teir lesa. Hetta er eisini ein snild, sum gevur næmingunum eina hóming av, hvørt tey hava skilt tað, tey hava lisið, ella ikki.

- *sjálvstøðugt at velja og læna bøkur á bókasavni og lesa eftir egnum áhuga og førleika*

*Føroyskt 1-A*

Ein av fortreytunum fyri, at næmingarnir kunnu fáa góðar lesivanar og varðveita góðan lesihug, er, at tey hava atgongd til nógvar og fjølbroyttar bøkur, bæði viðvíkjandi evnisvali, tekstslagi og torleikastigi. Førleikin sjálvstøðugt at velja og læna bøkur á bókasavni er treytaður av, at næmingarnir vita, hvussu bøkurnar á bókasavninum eru skipaðar, og tí eiga tey javnan at fáa høvi at vitja bókasavnið. Bókavørðurin er natúrligur partur av hesi tilgongd sum ráðgevi og kveikjari. Lærarin hevur ein týðandi leiklut at vegleiða næmingunum, so tey stigvíst megna hetta sjálv. Sjálvstøðugt at læna bøkur eftir egnum áhuga krevur, at næmingarnir duga at yvirlitslesa, so tey kunnu meta um, innihald, torleikastig og áhugamál. Lærarin eigur í fyrstani at leggja dent á at hjálpa næmingunum at meta um egnan lesiførleika fyri at kunna velja hóskandi tilfar. Her kann 5-fingrareglan nevnast: Um næmingurin hevur ilt við at lesa fleiri enn fimm orð á eini síðu við hundrað orðum, t.e. antin at avkoda ella at skilja, so er bókin ov trupul, og hann/hon eigur at velja eina lættari bók.

- *at skilja og greina ymisk viðkomandi fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*

*Føroyskt 1-A*

Førleikin at skilja og greina ymisk tekstsløg snýr seg á hesum stigi um, at næmingarnir fáa innlit í ymisk tekstsløg, bæði fagrar bókmentir, yrkisbókmentir og margháttað tekstsløg. Tað er umráðandi, at næmingarnir læra sereyðkennini fyri hvørt tekstslag sær. Næmingarnir læra gjøgnum bókmentir at skilja seg sjálv og umheimin. Tey kunnu spegla sær í persónum og viðurskiftum í bókmentunum. Hetta birtir undir sjálvsmenningina og kann læra tey at seta spurningar til sín sjálvs, til viðkomandi viðurskifti og til umheimin, samstundis sum tey læra at ferðast gjøgnum lívið í einum fólkaræðisligum samfelag. Næmingarnir skulu í ávísan mun læra at greina tekstsløgini. Tá tey greina ymsu tekstsløgini, læra næmingarnir bæði at skriva og greiða frá. Eisini kunnu tey við skapandi avrikum vísa, at tey fata innihald og støður og megna at gera egnar tulkingar við støði í tekstinum. Tá talan er um fagrar bókmentir, læra næmingarnir at gera samandrátt, lýsa høvuðspersónar og evni. Í yrkingum læra næmingarnir um bygnað, rím, skaldslig orð og boðskap. Tá arbeitt verður við yrkisbókmentum, læra tey at síggja eyðkennini við hesum tekstslagi. Næmingarnir læra um sendara og móttakara og um boðskap og skrivisnildir, sum eyðkenna hetta tekstslagið. Tey skulu læra at gerast varug við trúvirði og at fyrihalda seg kritiskt til boðskapin. Í margháttaðum tekstum læra næmingarnir, umframt boðskap, snildir og evni, at síggja samspælið millum myndir/film og tekst, og hvussu hesi stuðla undir hvørt annað.

Í miðdeild verður væntað, at flestu næmingar lesa raðið, og tí kunnu lesa tekstir sjálv. Møguleiki skal vera at fáa tekstin lisnan upp, um tørvur er á tí.

- *at skipa setningar og tekst og nýta viðkomandi skrivihættir, herímillum ávegisskriving*

*Føroyskt 1-A*

Førleikin at skriva snýr seg um at greiða frá og samskifta skrivliga. Dentur verður lagdur á, at næmingarnir seta orð á hugsanir og kenslur, umframt at tey menna hugskot og viðgera ymisk

viðkomandi evni. Næmingarnir skulu læra at lýsa eitt evni frá ymiskum sjónarhornum og læra at fyrihalda seg til ítøkilig og viðkomandi viðurskifti.

Lesi- og skriviførleikin er sínámillum treytaður, og fortreytin fyri at skriva ein tekst er, at næmingarnir hava neyðuga orðfeingið og duga at fata, tulka og seta orð og hugtøk í rætt høpi. Umframt at skriva og skapa egnar tekstir í ymsum tekstsløgum, so fevnir skriviførleikin eisini um stavseting, setningsbygnað og tekstbygnað. Skrivligt samskifti er fjøltáttað og fer fram á ymsum pallum, eisini á netinum. Næmingarnir skulu læra at skilja og nýta fjøltáttaðu skrivligu samskiftismøguleikarnar kritiskt og læra at samskifta skrivliga á fjølbroyttan, virðiligan og sakligan hátt, hóskandi til samskiftisstøðu og móttakara.

Tað er umráðandi at næmingarnir fáa høvi at nýta og víðka hugflogið. At skriva søgur og ævintýr, har bert hugflogið seta mørkini. Næmingarnir skulu læra at nýta ymiskar skrivisnildir, so sum hugarok, snarskriving, og at skriva eftir givnum fortreytum, t.d. fáa orð, setningar ella mynd at skriva eftir. Næmingarnir skulu læra ávegisskriving. Hetta er ein skrivitilgongd, har næmingarnir læra at arbeiða víðari við egnum tekstum og finna loysnir, sum gera tekstin enn betri. Hetta háttalagið stuðlar undir og stimbrar áhaldni og djúphugsni.

- *at skriva tekstbrot við lesiligari og stinnari hondskrift og við knappaborði*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu halda fram at venja og menna hondskriftina, og miðast skal eftir at fáa skrivingina í eina trygga legu, so persónliga hondskriftin verður trygg, skjót, samanbundin og lesilig. Fyri at náa hesum ávegismáli, er tað týdningarmikið, at hondskriving eins væl og skriving á knappaborði er partur av undirvísingini øll skúlaárini í miðdeild. Næmingarnir skulu duga at skriva ymiskar tekstir við lesiligari og samanbundnari hondskrift. Tey skulu læra at seta skrivligu avrikini væl og greitt upp og at hava góðan ordan. Væntað verður, at næmingarnir í 6. flokki duga at skyna á nær skrivað verður við lítlum og stórum bókstavum.

- *at skriva tekst sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðalagi*

*Føroyskt 1-A*

Í miðdeild skulu næmingarnir halda fram at menna sínar skrivligu førleikar, og ávegismálið er, at tey stigvíst læra at skriva sjálvstøðugar tekstir.

At gerast stinn/ur í at orða seg skrivliga er ein tilgongd, sum krevur miðvíst arbeiði og venjing, og tí skal undirvísingin í miðdeild skipast soleiðis, at næmingarnir áhaldandi styrkja sín skriviførleika, samstundis sum tey varðveita hugin at læra. Tilgongdin at evna eitt sjálvstøðugt skrivlig avrik kann í høvuðsheitum býtast upp í 3 stig:

1) Fyrireiking, har dentur verður lagt á at finna hugskot, hava hugarok til innihald o.a.
2) Sjálv skrivingin, skriva kladdu, at skipa tekstin og lýsa og viðgera evni og viðurskifti.
3) At gera avrikið liðugt, sum snýr seg um at endurlesa, rættlesa og sum heild bøta um avrikið.

Meðan næmingarnar arbeiða við hesum ávegismáli, ogna tey sær samstundis gott arbeiðslag og góðar vanar. Her verður hugsað um vanar, sum t.d. at gera sær ómak, leggja seg eftir at brúka fjøltáttað orðfeingi og at orða seg rætt, neyvt og fjølbroytt.

- *at nýta orðalistar og orðabøkur sum hjálparamboð til stavseting og rætta málnýtslu*

*Føroyskt 1-A*

Undirvísingin skal framhaldandi tryggja, at næmingarnir læra at brúka møguleikarnar í talgildum orðabókum og orðalistum. Tey skulu læra at finna orð, bendingarsnið, samheiti og andnevni. Næmingarnir skulu læra at leita í viðkomandi orðalistum og orðabókum. Viðkomandi er, at næmingarnir læra at leita í bókstavarað, sum er hent at duga, um orðalistarnir eru í pappírsformi.

- *málllæru, herímillum stavseting, teknseting, bendingarlæru og orðalagslæru*

*Føroyskt 1-A*

Grundleggjandi mállæra í miðdeild snýr seg um, at næmingarnir við støði í egnum teksti, læra at seta punktum, nær skrivað verður við stórum bókstavi og at skipa setningar. Stigvíst skal mállæruparturin víðkast til at fata um at seta komma, kolon, gásareygu og spurnartekin. Í sambandi við bendingarlæruna eigur dentur at vera lagdur á vanligastu bendingarmynstrini. Her verður hugsað um at benda sagnorð, stigbenda reglulig lýsingarorð, duga kynini og stigvíst læra at seta navnorðini í rætt fall.

- *at vísa kunnleika um málsliga variatión, herímillum staðbundnan málføramun*

*Føroyskt 1-A*

Tá talan er um málsliga variatión, verður hugsað um munin á talumáli og skriftmáli og á formligum og óformligum máli. Harumframt skal undirvísingin eisini nema við málbrúk á sosialum miðlum. Næmingarnir skulu eisini læra at kenna mun á ymsum málførum, serliga teimum stóru málføraøkjunum, sum eru økini sunnanfjørðs, miðstaðarøkini og Norðuroyggjar.

- *at vísa kunnleika um norðurlendsk mál í talu, serliga norskt og íslendskt.*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu fáa kunnleika um norðurlendsku talumálini og skilja einfalt norskt og íslendskt talumál. Undirvísingin eigur eisini at fata um málsliga sambandið millum føroyskt, norskt og íslendskt.

# 2.2. Støðisførleikar

## 2.2.1. Lesing

*At lesa er ein fjøltáttað fatanarlig og málslig tilgongd, sum krevur, at lesararnir avkoda og síðan tulka tekstin við støði í vitanini, sum tey hava frammanundan.*

*Næmingarnir skulu læra at avkoda og tulka tekst í øllum sínum ymisleika. Góð lesiundirvísing hevur til endamáls at menna og stimbra lesføri næminganna í ymsum tekstsløgum í øllum lærugreinum. Víðkaða teksthugtakið fevnir, umframt um orð, tekn og bókstavir, eisini um aðrar tekstlutir, sum næmingarnir skulu læra at týða, so sum myndir, livandi myndir og ljóð.*

*Eitt gott lesiumhvørvi í skúlanum er ein fortreyt fyri at menna lesføri og góðar og fjølbroyttar lesivanar. Umráðandi er, at skúlin miðvíst og tilvitað skapar eitt lesiumhvørvi, har næmingarnir áhaldandi fáa ment lesføri og lesivanar, soleiðis at tey halda fram at lesa av áhuga og forvitni. Í*

*hesum sambandi er tað av stórum týdningi, at skúlabókasavnið er ein natúrligur partur av skúlagongdini.*

*Støðisnámsætlan*

Undirvísingin í miðdeild skal byggja víðari á lesiførleikan, sum næmingarnir hava ognað sær frammanundan. Næmingarnir skulu lesa fjølbroyttar tekstir í undirvísingarhøpi umframt tekstir og bøkur, sum tey sjálv velja av áhuga ella forvitni. Í byrjanini í miðdeild er lesiførleikin hjá nøkrum næmingum enn so avmarkaður, at tað fellur mongum teirra tungt at lesa drúgvan tekst og bøkur. Hetta kann føra við sær, at tey missa hugin at lesa. Tí er týdningarmikið, at hesir næmingar fáa hjálp og stuðul í lesimenningini.

Frásøgn og upplestur lærarans hevur stóran týdning fyri nógvar næmingar, bæði viðvíkjandi uppliving og tileggjan til at halda á at lesa. Tí eigur upplestur lærarans at vera partur av undirvísingini í miðdeild.

Í endanum á miðdeild er málið, at flestu næmingarnir duga at lesa raðið, t.e. at næmingarnir er stinnir í avkodan, lesifatan og skjótleika. Tað er tí alneyðugt, at undirvísingin verður skipað soleiðis, at næmingarnir í miðdeild halda á lesa nógv og miðvíst. Lesingin má tí venjast bæði í skúlanum og heima.

Næmingarnir skulu støðugt menna sín lesiførleika og stigvíst læra at grunda um, greina og taka sjálvstøðugt støðu til innihaldið. Tað er umráðandi, at undirvísingin stuðlar undir, at næmingarnir, við treysti og áliti á egin evni, halda á at styrkja lesiførleikan. Undirvísingin skal skipast soleiðis, at umstøður fyri djúphugsni og nærlagni verða raðfestar.

## 2.2.2. Skriving

*Førleikin at skriva snýr seg um at greiða frá og samskifta skrivliga. Dentur verður lagdur á at seta orð á hugsanir, evni og kenslur, umframt at menna hugskot og viðgera ymisk viðurskifti skrivliga í øllum lærugreinum. Førleikarnir at lesa og skriva eru sínámillum treytaðir, og fortreytin fyri at skriva ein tekst er, at næmingarnir hava neyðuga orðfeingið og duga at fata og tulka og seta orð og hugtøk í rætt høpi. Skrivitilgongdin stuðlar undir fatanina og at skipa tankar og hugskot.*

*Umframt at næmingarnir skulu ogna sær førleikar at skriva og skapa egnar tekstir í ymsum tekstsløgum, so fevnir skriviførleikin eisini um stavseting, setningsbygnað og tekstbygnað. Skriving fevnir eisini um víðkaða teksthugtakið, og næmingarnir skulu læra at arbeiða við marghættaðum tekstum og knýta skrivaðan tekst og aðrar framsagnarhættir saman.*

*Skrivligt samskifti er fjøltáttað og fer fram á ymsum pallum. Næmingarnir skulu læra at skilja og nýta fjøltáttaðu skrivligu samskiftismøguleikarnar kritiskt og læra at samskifta skrivliga á fjølbroyttan, virðiligan og sakligan hátt, hóskandi til samskiftisstøðu og móttakara.*

*Støðisnámsætlan*

Skrivingin í miðdeild skal leggja dent á, at næmingarnir stigvíst gerast stinnari at málbera seg skrivliga. Skal hetta eydnast, er neyðugt, at tey skriva nógvar og ymiskar tekstir og venja/røkja skriving regluliga. Tey skulu gerast meira sjálvstøðugt í skrivingini og stigvíst læra at skriva drúgvari

samanhangandi tekstir, bæði fagurfrøðiligar tekstir og yrkistekstir, umframt at tey skulu loysa ymsar smáar skrivligar uppgávur. Umráðandi er, at tey eisini fáa møguleika at nýta hugflogið og skriva frítt úr egnum barmi, so tey læra at taka støði í egnari vitan, egnum royndum og hugsanum í skrivliga arbeiðinum. Næmingar skulu læra at laga skrivliga avrikið til móttakaran og til væntanirnar í fakligu uppgávunum. Lesingin og skrivingin eru samantvinnaðar tilgongdir, sum stuðla undir hvørja aðra, og tí eigur skrivliga arbeiðið at vera partur av munnliga tekstarbeiðinum.

Í middeild verður framhaldandi skrivað við hond, men tað er eisini hesi árini, at partar av skrivligu avrikunum verða skrivaðir við teldu. Umráðandi er, at undirvísingin verður skipað soleiðis, at næmingarnir halda á at menna hondskriftina. Men tað er samstundis umráðandi, at næmingarnir eisini læra at nýta knappaborð. Skilagott er at skipa skrivliga partin soleiðis, at tað er greitt, nær skrivað verður við hond, og nær knappaborð verður brúkt.

### 2.2.3 Munnligt samskifti

*Munnligt samskifti snýr seg um at tosa, bera fram, skifta orð um, samrøða, grundgeva og lurta. Munnliga samskiftið skal stimbrast og mennast í øllum lærugreinum. Munnligt samskifti skapar samband við onnur og er týðandi liður í at menna persónligar, mentanarligar og sosialar førleikar. Kropsmálið er eisini ein týdningarmikil partur í munnligum samskifti, sum næmingarnir skulu læra at gerast tilvitaðir um. Næmingarnir skulu læra at bera fram og vera tilvitaðir um sendara- og móttakaraviðurskifti og at lurta og geva aftursvar.*

*Munnligt samskifti er fjøltáttað og fer fram á ymsum pallum. Skúlaverkið skal tí eisini búgva næmingarnar til at nýta og skilja fjøltáttaðu samskiftismøguleikarnar og í læritilgongdini ogna sær førleikar at brúka hesar í viðkomandi høpi og kritiskt taka støðu til teir.*

*Støðisnámsætlan*

Tá næmingarnir ganga í 4. 5. og 6 flokki verður væntað, at tey hava royndir at samskifta um ymiskar fakligar og aðrar viðkomandi spurningar. Tó kann tað vera ymiskt, hvussu væl fyri tey eru fyri at orða seg og at taka lut í samskiftinum í flokkinum. Undírvísingin eigur framhaldandi at geva øllum næmingum møguleika at menna munnligt samskifti við støði í teimum fortreytunum, sum tey hava. Stigvíst eigur munnligt samskifti at skipast sum kjak um og viðgerð av viðkomandi faklig evnum. Dentur eigur at leggjast á at skapa góðar og tryggar karmar um samskiftið í flokkunum, soleiðis at allir næmingar sleppa til orðanna, og at virðing og tolsemi eru grundarlag undir samskiftinum og samveruni í flokkinum.

### 2.2.4 Kt- førleikar og talgildisbúgving

*Kt-førleikar og talgildisbúgving snúgva seg bæði um førleikar at brúka ítøkilig, viðkomandi kt-amboð og at skilja amboðini, og í hvørjum samanhangi tey skynsamt kunnu nýtast. Eisini snúgva kt-førleikar og talgildisbúgving seg um atferð á talgildum miðlum og keldukritiska viðgerð av talgildum tilfari. Endamálið er at búgva næmingarnar til at vera virknar, sjálvstøðugar, kritiskar og fólkaræðisligar borgarar í einum talgildum samfelag.*

*Støðisnámsætlan*

Í miðdeildini skulu næmingarnir framhaldandi arbeiða við kt-amboðum og talgildisbúgving. Viðkomandi er framhaldandi at tosa um samskifti og atburð á talgildum pallum og á sosialum miðlum, og um samtykkisreglur í sambandi við myndir og filmsbrot. Næmingarnir eiga eisini at fáa innlit í at leita eftir viðkomandi upplýsingum á netinum, t.d. at brúka talgilda bókasavnsskipan, netbornar orðabøkur og at finna aðrar viðkomandi upplýsingar á netinum og viðgera hesar keldukritiskt. Í sambandi við skriving eiga næmingarnir at læra at brúka knappaborð.

# 3. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Í hesum sambandi er tað týdningarmikið, at skúlaverkið strembar eftir at skapa eitt trygt og mennandi undirvísingarumhvørvi, har undirvísingin er fjøltáttað og væl skipað við dygdargóðum fakligum innihaldi og háttaløgum. Harumframt er tað týdningarmikið, at undirvísingin hevur ítøkilig mál, so næmingarnir vita, hvat uppgávurnar fevna um, og hvat væntað verður av teimum.*

*Eftirmeting av úrtøkuni gevur bara meining, um hon verður fylgd upp av ítøkiligari afturboðan, sum tekur saman um núverandi støðu, heildarúrtøku og menning næminganna. Lærararnir skulu tí hava innlit í úrtøku, arbeiðslag og ídni hjá næmingunum í læritilgongdini.*

*Afturboðanin til næmingarnar skal leggja dent á næsta stig í tilgongdini og undirvísingina frameftir. Fyri næmingarnar snýr tað seg um, hvussu tey kunnu menna úrtøku og hegni, umframt hvussu tey kunnu tillaga ella møguliga bøta um arbeiðslag og avrik. Fyri lærararnar snýr afturboðan seg um at tillaga undirvísingina við støði í vitan um næmingaúrtøku, undirvísingargongdir, háttaløg o.a.*

*Eftirmetingin skal saman við afturboðan leggja áherðslu á læri- og menningartilgongdina heldur enn á sjálvt úrslitið. Endamálið er at eggja og stuðla næmingunum í áhaldandi at vilja læra og menna fakligu, persónligu og sosialu fortreytirnar.*

*Støðisnámsætlan*

Til at stuðla áhaldandi menning, virknari luttøku og fakligari úrtøku skulu næmingarnir javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði.

Regluliga eftirmetingin er sameindur partur av undirvísingini og er, saman við ítøkiligari afturboðan til næmingarnar, kjarnin í eini dygdargóðari eftirmetingarskipan. Eftirmetingin skal tryggja lærarum innlit og vitan í fakligu úrtøkuna og heildarmenningina hjá einstaka næminginum og flokkinum og vera didaktiska grundarlagið undir møguligum tillagingum. Eftirmetingin skal somuleiðis vera grundarlag undir regluligu afturboðanini til næmingarnar og foreldrini.

Skilagott er at eftirmeta saman við næmingunum, bæði einsæris og í flokkinum. Týdningarmikið er, at tey kenna seg trygg og hoyrd og fáa høvi at umrøða ymisk ivamál ella avbjóðingar, sum tey hava í læritilgongdini ella í samstarvinum í flokkinum ella við lærarar. Upplagt er eisini javnan at vísa næmingunum á fakligu førleikamálini og støðisførleikarnar, so tey vita, hvat væntað verður av teimum.

Afturboðanin til næmingarnar skal leggja áherðslu á næsta stig í tilgongdini og stuðla næmingunum í undirvísingini og fjølbroyttu menningini frameftir. Tað er eisini týdningarmikið, at næmingarnir fáa leiðbeining um tað, sum er viðkomandi fyri skúlagongdina frameftir, bæði viðvíkjandi arbeiðslagi og luttøku í undirvísingini og viðurskiftunum við aðrar næmingar.

Afturboðanin eigur at vera jalig, skilt á tann hátt, at dentur í afturboðanini verður lagdur á læri- og menningartilgongdina, so tey varðveita hugin og treysti at læra og taka virknan lut í undirvísingini. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.